# Trygd bjóðar ellis-trygging



**Líkt er til, at kapping nú eisini er um at tryggja ellisakfør. Tryggingarfelagið Trygd bjóðar nú eisini serliga trygging fyri ellisakfør**

*Ingi Justinussen*

Føroya Ellisakfør kunnu nú fegnast um, at Trygd eisini bjóðar seg fram at tryggja akfør okkara. Leingi hevur Tryggingarfelagið Føroyar verið eisamalt um hetta, men nú er so broyting komin í.

Møguleiki er at tekna vanliga ábyrgdartrygging. Harumframt er møguligt at tekna trygging, sum fevnur um ábyrgd og brand og eina, sum fevnir um ábyrgd og kasko.

Við nýggju tryggingini kunnu akførini koyra 5.000 km um árið í mun til 1.500 km, sum vit hava havt higartil.

Hetta samsvarar eisini væl við ásetingarnar hjá Bileftirlitinum, tí sambært kunngerðini um ellisakfør er tað treyt, at akfarið ikki koyrir meira enn 5.000 km um árið.

Til dømis er ábyrgdartryggingin umleið 25% bíligari enn vit kenna higartil, og á TRYGD siga tey, at áhugað altíð eru vælkomin at venda sær til teirra viðvíkjandi trygging av ellisakførum.

## Næsta blað í januar

Hetta er aðru ferð, at blaðið verður prentað í avísformi. Blaðnevndin er nøgd við nýggja sniðið, og verður blaðið í hesum líki framyvir.

Næsta blaðið kemur í januar, og vil blaðnevndin við hesum nýta høvi at ynskja øllum lesarum gleðilig jól og gott nýggjár



*Mynd frá 1960 við bilafyritøkuna hjá Vilhelm Nielsen í Jónas Broncksgøtu. Fleiri Bedford lastbilar og Vauxhall persónbilar*

# Vauxhall bilar í 100 ár

**Í ár eru liðin 100 ár síðan fyrsti Vauxhall bilurin bleiv gjørdur. Flestu bilmerkir eru uppkallaðir eftir stovnarunum av bilverksmiðjuni, men soleiðis er ikki við Vauxhall. Vauxhall hevur fyrr verið eitt kent bilmerki í Føroyum**

*Magnus Gunnarsson*

Skotski verkfrøðingurin Alexander Wilson stovnaði í 1857 fyritøkuna, Vauxhall Ironworks. Navnið koma av tí, at hon lá nærhendis tí gomlu Vauxhall Gardens stuttleika-viðalundini í London. Sum búmerki valdi hann eina leyvu við veingjum og høvdinum á eini ørn, sum enn í dag er búmerkið hjá Vauxhall.

Hesin Alexander Wilson var ein dugnaligur verkfrøðingur, og hansara verksmiðja framleiddi dampmaskinur til sleipibátar, hjóldamparar og onnur før. Stutt fyri aldarskiftið kom fyritøkan í so álvarsligar fíggjarligar trupulleikar, at kreditorarnir yvirtóku Vauxhall Ironxorks. Sum hjá fleiri øðrum mekaniskum fyritøkum hesa tíðina fekk nýggja leiðslan í fyritøkuni áhuga fyri bilframleiðslu.

Úrslitið av hesum varð, at teir farmleiddu fyrsta Vauxhall bilin í 1903. Í 1905 flutti verksmiðjan til Luton, tað árið framleiddu teir 20 bilar við trimum cylindarum. Í november mánaði sama árið høvdu teir ein bil við fýra cylindarum á London bilaframsýningini. Hetta var fyrsti Vauxhall bilur við teimum eyðkendu listunum á motorhjelminum, sum hava fylgt Vauxhall bilunum næstan heilt fram til okkara dagar.

Í 1925 fekk hendan fyritøkan eisini fíggjarligar trupulleikar við tí úrsliti, at General Motors yvirtók allan partapeningin í Vauxhall bilverksmiðjuni. Í 1931 fóru Vauxhall at framleiða Bedford lastbilar. Navnið kom av at verksmiðjan lá í Bedfordshire í Luton. Hesir bilar vórðu beinanvegin sera væl móttiknir og seinni gjørdu teir eisini smærri lastbilar og vøruvognar.

Vauxhall kom, eins og restin av enskum bilaídnaðinum, í eina svára kreppu í sekstiog sjeytiárunum. Í dag eru flest øll á einum máli um, at hendan kreppan kom av manglandi nýhugsan, og at tað ikki vóru teir røttu fakfelagsleiðararnir, sum sótu við valdinum.

Broytingin kom, tá Henry Ford II hótti við at niðurleggja Ford-verksmiðjurnar í Onglandi, og General Motors søgdu, at teir umhugsaðu at gera Opel bilar í Belgia ístaðin fyri Vauxhall. Hvørgin av hesum hóttanunum vóru førdar út í lívið tá, og partarnir á arbeiðsmarknaðinum komu til sættis.

Hugsanin um at Vauxhall-verksmiðjan eins væl kundi gera Opel bilar bleiv seinni veruleiki, við tað at Vauxhall og Opel arbeiddu saman um felags ætlanir. Vauxhall framleiða í dag somu bilar sum Opel við smærri broytingum og Vauxhall búmerki og navni.

Í Føroyum hava koyrt nógv ymisk sløg av Vauxhall og Bedford bilum. Í 40-unum koyrdu nógvir Vauxhall 14 her sum hýruvognar, og seinni komu t. d. Vauxhall Velox, Cresta og Victor.

Saman við t. d. Austin/-Morris vóru Bedford mest seldu lastbilarnir í mong ár.



*Vilhelm Nielsen, ið umboðaði Vauxhall í Føroyum*




*Niðari bilverkstaðurin hjá Vilhelm Nielsen. Vauxhall-Bedford og Opel skeltir og GM service. Hesin bygningurin bleiv tikin niður, tá skrivstovubygningurin hjá Smyril Line bleiv bygdur ístaðin*